Fornnorrønt fn verður føroyskt dn.[1]

Eftir *Chr. Matras.*

Sambandið *fn* verður nú í íslendskum framborið *bn*, men í mongum norskum málum og í svenskum verður sagt *mn*, í summum norskum málum, í föroyskum og í donskum *vn* (ella *wn*). Men í föroysku orðunum *kódna* v., *kódn* f., *tódna* v., *tódn* f. verður nú sagt *dn*, har fornföroyskt eigur at hava havt *fn*.

Av málrót, sum av fyrstu tíð merkir »knúska, knoða, trýsta saman«, hevur íslendskt mál í forntíð og nútíð navnorðið *þóf* n., sum nú hevur hövuðsmerkingina »töving«, men sum í dömum úr fornmáli (sí Fr. og Cleasby-Vigfússon) merkir »treinging, trongd« o. til. Eftir Bl. merkir *þóf:* »valkning (BH: fullonica), töj som valkes; langsommeligt arbejde (BH: labor vilis et assiduus); uafgörende trættende kamp, trækken i langdrag« o. s. fr. Hevði orðið verið til í nýföroyskum, hevði tað itið **tóv* ella **tógv* (sbr. *kóv* ella *kógv* n.). Einasta hvörkikynsorðið í föroyskum, sum eitur *tógv* er annað orð (ísl. *tó* n.) — Í norskum er orðið, og eitur tað har *tov* n., sum Aasen týðir soleiðis: »valkning, sammenfiltning, såsom af uld eller uldtøj; filt, sammenvalket töj« (hetta seinasta sýnir helst samanbland av *tov* n. og *tove* m., sí seinni).Aasen nevnir eisini eitt hvörkikynsorð við *ö* (sjálvljóðið í sagnorðinum *töva*): *töv* n. »valkning, sammen-

filtning« (eisini: »tidsspilde, unyttige forsög, arbejde uden fremgang; vås, unyttig snak« o. til.) — Av íslendskum orðum, har *þóf* er fyrri samansetingarliður, skal eg nevna: *þófferð* f. »valkervandring«, *þófgróinn* adj., »sammenfiltret på grund af valkning; tæt«, *þófstaður* m. »sted, hvor man valker, valkeri« (BH: fullonica) og *þófsmunur* m. »hvad töjet kryber ind ved valkning« (sbr. Aasen: *tövmun* m. »indsvinden i valkningen; forskel imellem valket og uvalket töj«) — Sagnorðið av stovninum í orðinum *þóf* æt á fornmálinum þófa (frumsniðið: *þōfian ella *þōbian), nýísl. hevur *þæfa*, norsk og föroyskt *töva*. Í íslendskum og norskum, og fyri ein part í föroyskum, eru eisini aðrar merkingar enn »at töva vadmal o. til.«, sí BH, Bl. og Aasen. — Navnið á tí,ið tövir, er gjört av stovninum í orðinum *þóf* við endingini *-ari:* á íslendskum *þófari* m. (norskt *tövar* m. hevur bæði annað snið og aðra merking), á föroyskum *tóvari*, sum kortini neyvan er til uttan í samansetingum (töving er konufólkaarbeiði í Föroyum), t. d. *tóvarakona, -fjöl, -luttur*. — Töving eitur eisini á íslendskum *þæfa* f., og kanska er hetta orðið (*þófa) til í hjaltlendska staðanavninum *Tövakoddi* (sí Jakob Jakobsen: Shetlandsöernes stednavne, 1901, bls. 120, Chr. Matras: Stednavne paa de færöske Norðuroyar, 1933, bls. 304) og í föroyska orðinum *tövulongd* f. (nóg stór longd til, at eitt plagg tolir at *tódna);* kortini kunnu hesi orðini koma beinleiðis av sagnorðinum *at töva*. Annað föroyskt orð fyri töving verður nevnt seinni. — Slíkt, sum saman er tövt, eitur á íslendskum *tófi* m. Hetta er okkara *tóvi* ella *tógvi* m. Eisini í norskum (Aasen: *tove* m.) er orðið til, og í svenskum (sí t. d. hjá Hellquist: *tova*). Germanski fyrndarformurin man vera *þōfan — ella *þōban (við tvívarraðum b-i). Av tí, at merkingin í föroyskum nú kanska ikki beinleiðis sigur frá, at *tó(g)vi* er úrslitið av einihvörjari »töving«, skal eg nevna, hvat ið orðabökur siga frá merkingini í hinum málunum[2]. Tað er nóg mikið her at nevna týðingarnar hjá Blöndal og Aasen: Bl. hevur »filt; sadelpude; et af uld sammenvalket hestedæk-

ken; fodballe«, Aasen: »en liden sammenvalket hob, en tot el. visk«. Av hesum orðinum kemur m. a. íslendskt *þófahattur* m. »filthat«, norskt *tovhat* og föroyskt *tóvhattur*. — Av sama stovni sum *þóf* er lýsingarorðið ísl. *þófinn* (Bl.: sammenkrympet og meget sammenfiltret, som ved valkning), norsk *toven* (Aasen: filtet, sammenvalket; forviklet, urede) og föroyskt *tógvin*[3] fleirt.: *tóvnir* — framborið sum *rónir* av *rógvin*). Merkingin í föroyskum er »áhaldin, treiskur« o. tíl., ein merking, sum ikki er ólík henni í íslendskum *þæfinn* adj. (Bl.: som yder modstand) og *þæfni* f. indecl. (BH: contumacia, Bl: hårdnakkethed); hesi orð eru av sama stovni við umljóði.

Vit nærkast nú formi, har *fn* (»f« er her helst eitt tvívarrað b) verður *dn* í nýföroyskum. Eg meini við orðið fyri at »tövast«: ísl. *þófna*, norskt *tovna* og föroyskt *tódna*. Orðið sum er gjört av stovninum í *þóf* við hini væl kunnu orðgerðarendingini *-na (brotna, stikna* o. tíl.), hevur í öllum hesum trimum málunum hövuðsmerkingina »tövast«. — Hóast eg ikki rættiliga dugi at siga, hví »fn« her verður »dn« hjá okkum, skal eg kortini royna at flyta okkum eitt sindur longri aftur í tíðina, táið ljóðlagið í föroyskum var annað enn nú. Helst fyri 1400 var *ó* í föroyskum eftir öllum líkindum vorðið nakað sama tvíljóð sum nú, t. d. í orði sum *fór*, t. e. eitt ljóð, sum í 16. öld veruliga verður skrivað *ou*. Hetta tvíljóðið, sum summstaðni hevur nærkast *eu* (sum Svabo skrivar, sbr. norðan- og vestanframburðin), var eina ferð tvíljóð eisini framman fyri longum hjáljóði ella tveimum hjáljóðum (sbr. at Suðuroyarmál upp at okkara tíð eisini hevði formar sum *oudnar-* av *ódnar-)*. Elsta föroyska sniðið *þófna* hevur í 15. öld, haldi eg, itið okkurt sum *toufna*, og eg hugsi mær, at »f« her var eitt tvívarrað *b* við lyndi til at gerast lokaljóð, t. e. vanligt *b*, eins og í íslendskum regluliga frammanfyri *n*. Men av tí, at föroyskt ongantíð hevði ljóðsambandið *bn*, men ofta *dn* (t. d. *rodna* av *roðna*), kom »bn« at verða *dn*. Okkurt soleiðis hugsi eg mær ljóðgongdina at hava verið. At enda skal eg nevna, at Suðuroyarmál eis-

ini hevði sniðið *kóvna (kouna)* t. e. eitt snið, har hitt varraða hjáljóðið »f« hvörvur ella rennur saman við tvíljóðið *ou*. Men *tódna* er ikki einasta dömið um, at *fn* verður *dn*. Föroyskt hevur eitt navnorð, sum hini málini ikki eiga, við merkingini »töving«. Tað er orðið **tódn*, sum tó helst ikki er til uttan í samansetingunum *ótódn* f. (nú m. a. Norðuroyar mál) og *naggatódn*[4] f. Merkingin á hesum báðum orðunum er hin sama: »töving, sum ikki vil bera til«. Bæði orðini verða eisini nýtt í fluttari merking. — Föroyska orðið *-tódn* er gjört við at skoyta hina væl kunnu orðgerðarendingina *-n* aftur at stovninum í *þóf* (sbr. *sókn*, *tögn* o. til.), t. e. eitt gamalt **þófn*.

Vit venda okkum nú at orðstovni, sum sýnir okkum sama lag í orðasmíði og ljóðgongd sum stovnurin *þóf*.

Eg meini við fornnorrönt og íslendskt *kóf* n., föroyskt *kóv* ella *kógv* n., norsk *kov* n. (öll av **k(v)óf)* og orð av sama stovni. Fritzner, sum hevur orðið úr *Konungs Skuggsjá*, týðir *kóf* soleiðis: »rög, damp« (LH: »kov, det som kjöver el. tetter til, t. d. röyk«) og *kófviðri* n. (úr Fostbröðra sögu): »tæt eller tykt snefog« (LH: »vér med snökave«). Eftir Blöndal merkir *kóf* í nýíslendskum hetta: »uvejr el. snefog, som formörker hele himlen el. en del af synskresen; rendfog, jordfog, ogs. med snefog; hvirvlende snemasser . . .; snefald i stille vejr; snefog; sky fra nord el. öst; kvælende luft (p. gr. af varme el. rög): vanskelighed med at trække vejret, astma; stærk sved« (BH hevur bert: ningor tenuis, og: interclusio spiritus), og *kófviðri* n.: »tykt snefog«. Eisini aðrar samansetingar við orðinum »kóf« eru nevndar í nýíslendskum (sí BH, Cleasby-Vigfússon, Bl.). Í norskum merkir *kov* n. (eftir Aasen): »tilstoppelse, tildæmmelse; opdæmmelse af frost i vandet, bækkenes opstigning af is i bredderne; trangbrystighed, tungt åndedræt (med snue eller hoste)«. Av norskum samansetingum skal eg nevna hesar (allar hjá Aasen): *kovdam* m. »tyk sneluft«, *koveling* m. »tyk iling af sne el. regn« og *kovhella* f. »sam-

ling af slim i lungerne eller struben«. Umframt hetta hevur norskt eitt kallkynsorð *kove*, t. e. **kofi* (sbr. *þófi* m., sum frammanfyri er nevnt); merkingin er, sigur Aasen, »tungbrystighed«. Tílíkt kallkynsorð er hvörki í íslendskum ella í föroyskum. — Heldur ikki hevur föroyskt, tað eg veit, sagnorð sum íslendskt *kófa* v. impers. »fyge (om sne)« (Bl.) og norskt *kova* v. n. »tykke i luften, mörkne av uvejr« (Aasen). — At enda skal eg nevna, at föroyskt ikki hevur nakra navnorðsgerð av tí slagnum, sum íslendskt hevur í orðinum *kæfa* f. »tæt snefog; kvælningsanfald, åndeklemmelse, åndenöd (Bl., sbr. BH) og norskt í orðinum *kjöfa* f. »tungbrystighed, besværligt åndedræt (af forkölelse)« (Aasen).

Sagnorðið, gjört av stovninum í orðinum *kóf*, eitur á íslendskum *kæfa* »kvæle« (um royk, eld, ófrið o. tíl.), á norskum *kjöva* (eisini í merkingini: köva av) og föroyskt *köva*. Fyrndarsnið í hesum sagnorði er *k(v)ōfiən. Men áðrenn vit nevna eitt annað sagnorð av stovninum *kóf*, er vert at gera vart við, at norskt og föroyskt hava eitt lýsingarorð, sum er av somu gerð sum áðurnevnda *þófinn* o. s. fr. (av stovninum *þóf)*, og tað er norskt *koven* »om luften: tyk, og mörk, fuld af byger, som hindrer udsigten; indesluttet, skummel (om bosted); tungbrystig, angreben af snue eller brystsvaghed«. Hetta orðið hevur Aasen úr Vestur- og Norðurnoregi. Sum vit brátt fáa at vita, er sama lýsingarorðið til í föroyskum.

Íslendskt sýnist einki sagnorð at hava av stovninum í *kóf* — gjört á sama hátt sum *þófna* (av stovninum í *þóf-)*; í staðin fyri nýtir íslendskt *kafna*, av hinum nærskylda stovninum í *kaf-* (*kvaf-); men norskt hevur, umframt *kvavna*, eisini *kovna* (*kófna) »at kvæles, tabe åndedrættet«, sum samsvarar okkara *kódna*. Aasen hevur orðið *kovna* úr Vesturnoregi og Norðlandi, og í Amund B. Larsen og Gerhard Stoltz, Bergens bymål (1907) bls. 200, er tikið so til: »Det synes bare at være vestlige dialekter som avgjort slutter sig om grundformen **kófna*«.

Aftan á hesa uppreksan fara vit at líta eitt sindur at teim föroysku orðunum, sum hava fornmálsins stovn *kóf* í sær. Hvörkikynsorðið eitur, sum sagt, *kóv* ella *kógv*. Av tí at tilfar mítt úr egnum uppskriftum er at kalla einki, nýti eg her bert tað, sum eg havi funnið uppskrivað hjá dr. Jakob Jakobsen. Hann hevur *kóv* (helst eisini samansetingarnar *mjörkakóv* og *kavakóv)* úr Haraldssundi; annars sigur hann bert so: »tað er sovorðið *kóv* úti, t. e. klumrut luft« (leggur afturat: »*kóv* er tjúkkari luft, *hím* er tynnri luft«, og — um tað hoyrir uppí her — »um veturin tá ið mjörki er, vænta tey ringt veður«). Annars hevur hann úr öðrum stöðum skrivað upp: *kavakógv*, t. e. »kavaælingur uppi í fjöllunum við toku«, og *mjörkakógv* (-kågv), hetta seinna úr Suðuroy[5]. Dr. Jakobsen hevur eisini (úr Norðuroyggjum?) eitt lýsingarorð, sum man vera beinleiðis gjört av navnorðinum *kóv*, hóast fyrri liður er *kóva-* (regluligt var bert *kóv-)*. Tað er skrivað upp soleiðis: »tað sær so *kóvaligt* út, t. e. tað er so klumrut at síggja, tjúkk luft, tað sæst ongan veg fyri toku — eingin vindur, eitt sindur regn«. — Úr Suðuroy hevur dr. Jakobsen lýsingarorðið *kógvin* (sama sum norska *koven*, eldri **kófinn)*: «tað er *kógvið* (kågvi) í mjörka«.

Vit minnast, at vit áður hava nevnt föroyskt *tódna* v., sum er sama orðið sum íslendskt *þófna* og norskt *tovna*. Somuleiðis hevur föroyskt mál *kódna* v. av fornum **kófna*, norskum *kovna*. Men eisini eitt navnorð, sum í gerð er líkt föroyskum *-tódn* (av **þófn*), er til av stovninum í *kóf-*. Orðið hevur dr. Jakobsen skrivað upp í Suðuroy í hesum setninginum: »tað er *kódn* (kådn) í mjörka«. — Annars er tað at siga, at eins og *tódna* á Suðuroyarmáli kann eita *tóvna*, örminnist eg um, at mær er sagt, at sagnorðið at *kódna* har áður eisini æt *kóvna*. Av tí, at eg havi mist burtur uppskrift mína, tori eg ikki at siga hetta við vissu.

Ætlanin við hesi ritgerðini er at vísa á hina sjáldsomu ljóðgongdina, sum er til skjals í orðum sum *tódna* og *kódna* (av þófna og *kófna), har »fn« er vorðið *dn*. Eg havi

roynt at greina tilgongdina á tann hátt, at aftan á tvíljóðið *ou* (ella *eu*) hevur málið mest sum kravt eitt lokaljóð, og táið *bn* er málinum ókunnugt, er tað broytt til *dn*, sum vanligt var í sagnorðum (av *ðn*) við endingini *-na*. Henda greiningin er kanska ikki bein. Tað er ikki heilt óhugsandi, at *þófna* og *kófna* fyrst eru vorðin *tounna* og *kounna*, og at *nn* síðan er broytt til *dn*. Vanliga verður *nn* ikki *dn* aftan á *ó* (og *á*, *ú*) uttan í Suðuroyarmáli, men eitt orð ber tó prógv um, at norðanmálini hövdu sama lyndi, ella beinari kundu fáa *dn* av upprunaligum *nn* aftan á *ó*. Eg meini her við orðið, sum fyri vestan eitur *ódnur* m., og sum t. d. í Norðuroyarmáli eitur *ódn* f. (um merkingina sí M. A. Jacobsen & Chr. Matras: Föroysk-donsk Orðabók, 1927-28, undir *ódn*[2]); hetta orðið hevur undir liðini á sær eitt sagnorð, sum eitur at *öna*. Orðið *ódn(ur)* má av fyrstu tíð vera eitt kallkynsorð, sum í hvörfalli æt **ónn*, í hvönnfalli *ón*. Er hetta beint, og eg ivist ikki í tí (tíverri fái eg ikki her borið fram prógvini), hevur norðanmál eisini kent ljóðgongdina *nn* > *dn* aftan á *ó*.

1 Hesar styttingar eru nýttar av bókatitlum: BH (orðabók Björns Halldórssonar), Bl. (orðabók Blöndals), Fr. (orðabók Fritzners), LH (Leiv Heggstad: Gamalnorsk ordbok).

2 Smb. kortini *Tóvaraversið* (gandaörindi):

Töv hart, knúska fast,
saman loypur í tóva,
ikki meira eftir enn ein lóva (t. e. lógva).

og *Jákup á Mön:*

Toggarnsbuksur fór hann í,
tövdar upp í tógva.

3 Hjá Svabo eisini *tóvin* (skr.: teuin).

4 Hetta orðið sigst í Vágamáli nú, í hvussu er eisini at eita *naggatöving*. — Í S' (t. e. orðabókahandrit, sum Svabo skrivaði í Föroyum aftan á 1800) er orðið *ótódn* f. skrivað *Eutödn*

(mislykket valkning, ars fullonica in panno contrahendo impedita) og í M (handrit skrivað við hond Nicolai Mohrs, mest ímillum 1782 og 1790) *Outödn* (uhældig eller mislykket valkning, opus fullonis non succedens. Isl. *óþófnadr* it *leggja ótödn í*, (figurate) at begynde et værk slet, opus perverse instituere).

5 Veri mær loyvt her at biðja hugað fólk greiða mær frá nýtsluni av orðinum *kóv (kógv)* og samansetingum av tí nú á dögum og í ymsum landspörtum.

SUMMARY

Attention is drawn to an exceptional phonetic change of *fn* > *dn* in Faroese in the following words: tódna v. (Icel. þófna, Norw. tovna), tódn f. (*-þófn), kódna v. (*k(v)ófna, Norw. kovna), kódn f. (<*k(v)ófn).